**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2008?
Send eina grein til dorit@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er millum 8.000 og 10.000 tekn og skrivað í essay stíli,
tað vil siga ikki ein vísindagrein ella eitt ov missionerandi lesarabræv

**Næstu ferð**
Tíðargreinin týsdagin 8. januar: Sámal Matras Kristiansen, samfelagsfrøðingur. Evnið er: Javni ella framburður? Rættvísi ella effektivitetur?

# Desember



*Oddvør Johansen*
*Organistur við Havnar Kirkju og rithøvundur síðani 1982, tá hon debuteraði við skaldsøguni, Lívsins Summar. Seinasta bók hennara er savnið, Úr Køksvindeyganum, sum kom út í 2006*

So fer hann, desember. Stormur. Skrið. Onkrir sólglottar. Í nakrar dagar er tømingur, turrur vindur sunnanífrá. Úti á víðum havi berjir "Norrøna" seg gjøgnum sjóvarilskuna við ongum stabilisatorum, og flogførini lenda í øllum góðum. Tað lítla flogfelagið strevast fyri at gera viðskiftafólki sínum til vildar. So er tað eykalutir, sum verða fluttir, so sjúklingar, so tónleikarar, og sum dagarnir í desember ganga, síggjast okkara kæru "flytifuglar", tað unga fólkið, sum er í útbúgving uttanlanda, fjølgast á gøtum og strætum. Tey vilja heim í desember. Heim til brimdunið og hvirlur millum fjøll. Heim til desembermyrkrið og regnið, men eisini heim til ljósið í eygunum á teirra kæru.

Tú vaknar Tollaksmessumorgun í bølamyrkri, nú ið heglingur so grovur sum smágrýti berjir inn á rútin. Sunnudagur.

Uttanfyri sleingjast mínar smáu elektrisku perur higar og hagar. Tær vórðu longu hongdar út á tey smáu granntrøini í november. Hví í november? spyr ein. Jú, tí vit, sum liva so norðarlaga á jarðarkúluni, hava brúk fyri ljósi, smáum bjørtum geislum, sum bleiktra í myrkrinum.

Tað hevur einki við jól at gera. Fyri mær kundi Jesus tað sama verið føddur á Ólavsøku í árinum 6. Fyri meg var og er hann sami fantastiski boðberin, sami stóri nýhugsarin.

Men nú hava nøkur vís fólk eina ferð langt síðani latið hann føðast um sólstøður, og tað er fínar greyðir.

Tó tað halda ikki øll. Til dømis skírir eitt av okkara mætu skøldum jóltíðina "Jólalygnina". Hann heldur jólini vera "kapitalisma við turbo", og hann heldur eisini, at tú og eg keypa okkum fyrigeving fyri alt tað skeiva, vit hava gjørt gjøgnum árið. So østur er yrkjarin, at hann hevur hug at blaka eina hondgranat inn í heila fratið.

Vit skilja hann upp á mangar mátar. Tó – eingin verður tvingaður at fara inn í eina kapitalistiska turbo, tí jólini verða aldri annað enn tað, vit sjálvi gera tey til.

Desember er háárstíð hjá konsertunum. Her er alt, sum tú kanst droyma um: Havnar hornorkestur spælir jólasálmar undir Gamla bókhandli, útgávukonsertir eru við ungum framherjum, her eru barnafløgur, ráður rokkur, symfoniskar familjukonsertir, og "tað gráa gullið" fer eisini á pall. Kim Larsen, Johnny Logan og Niels Midjord. Her eru oratorii, frumframførslur, kamarkór, kirkjukór, kallakór, Suð, Dropar, Vox, matinéir. Føroyingar lyfta upp sínar røddir í túsundatali, tí jólini gera nakað við okkum. Tey eru av sonnum eitt Magnum Misterium.

Eg upplivi, at erkleraðir fríteinkjarar sláa ring og dansa rundan um tað grøna træið, syngjandi halleluja, halleluja.

Hallo!!

Í útvarpinum spenna tey seg út. Í ein knappan mána verða vit undirdíkt í søtum jólatónum. Bing Crosby og Frank Sinatra. Her eru ringlandi bjøllur, dalandi flykrur, her eru reinsdjór, sletur og vaniljukransar.

Í mínari verð er ein hin besta sendingin á vetrinum "Metro", sum Gunnar Nolsøe skipar fyri. Her er nakað óuppgjørt, nakað ekta og ósentimentalt. Livandi menniskju við lagnu og upp- og niðurtúrum luttaka, og tað er ikki oftari enn so, at ein vaskiektaður arkitektur gevur sítt íkast til eina útvarpssending.. Men í "Metro" hava vit hoyrt Albert Isfeldt, arkitekt, greiða frá ymsum byggilistarliga áhugaverdum støðum. Á ein erligan og óhátíðarligan hátt leiðir hann okkum - á ektaðum havnarmáli - gjøgnum ókendar leiðir, so at gluggar okkara opnast, og vit halda okkum læra eitthvørt.

Í løgtinginum er eitt hússetur hesar fyrstu dagarnar í desember. Val verður útskrivað, og teir (leggið merki til kallkynsformin) kappast nú um at sverta hvønn annan til. Síðan fara teir til jólaborðhald, har teir syngja í dubultkvartett við klaverfylgispæli. Vit kunnu bara vóna, at kvinnurnar nú fara at gera innrás.

Í november- desember gravi eg meg niður í orgultónleikin. Inn í ta friðsomu atventina, sum upprunaliga av sonnum var alt annað enn "kapitalisma við turbo", men ein føstutíð. Teir gomlu tónameistararnir hava í eini 900 ár givið okkum tilfar, sum heldur, tí tað tolir slit. Johan Sebastian Bach ber prísin. Hann málar við litríkum penslum, og sum tann trúgvandi matematikarin hann er, er nótamyndin full í symbolikki. Orgulkoralirnar eru rætt og slætt ein spegilsmynd av tekstliga innihaldinum, og tú lesur og hoyrir, at allir hesir sekstandapartarnir, ið sveima uppeftir og niðureftir sum firvaldar, mynda einglaskærarnar uppi yvir tí lítla fjósinum.

Júmen, hasin krossurin er jú eitt ræðuligt torturinstrument, sigur tann ungi læknin súrliga.

Ja, nettupp! Eitt symbol upp á tortur. Píning.

Hvussu høvdu vit gjørt í dag? Høvdu vit givið honum eina eiturssproytu ella spent hann fastan í elektriska stólin? Ella rætt hann við blóðtystum hundum og pínt hann við elektriskum stoytum, sum tey enn gera í siviliseraðum londum?

Í desember vaska tey bilar. Eg standi í bussskýlinum, meðan hundraðtals bilar rúsa framvið. Í teimum flestu situr EITT fólk. Eitt einsamalt menniskja, sum í tankaloysi situr og brennur ta seinastu oljuna á jørðini av, meðan miðlanir upplýsa okkum um Kyoto og CO2- útlát.

Dagurin í dag eitur "Nóa". Kanska er amerikumaðurin Al Gore ein modernaður Nóa. Nóa, sá fyri sær eitt øðiligt glopraregn við eftirfylgjandi flóðaldu, ið breyt fyri sær og skolaði gjøgnum øll londini niðri við Kaspiska havið. Tí tók hann stig til at smíða eitt veldugt "bingjuskip" við trimum dekkum, einans 14 metrar stytri enn okkara "Norrøna". (Tann seinasta ístíðin endaði fyri uml. 8500 árum síðani, høvini hækkaðu munandi, og fleiri mentanir siga frá um hetta skip, ið var bygt eftir nútíðar prinsippum høgt uppi á einum fjalli.)

*Framhald á næstu síðu*

*Tekning: Óli P*



Tíðargreinin